# Stjørnan hevði lætt spæl

**Sóljan kláraði í seinna hálvleiki ikki at fylgja við Stjørnuni, og mongu kontraálopini hjá Stjørnuni skaptu mun upp á 20 mál millum liðini**

HONDBÓLTUR-KVINNUR
*Eyðun Klakstein*


*Stjørnan vann uttan nakrar trupulleikar á Sóljuni sunnudagin. Munurin vaks bara sum dysturin leið*

Sóljan hekk so nøkunlunda í Stjørnuni fyrsta partin av dystinum, men í seinna hálvleiki vaks munurin millum liðini støðugt.

Tað vóru serliga tey mongu skjótálopini hjá Stjørnuni, sum í seinna hálvleiki høvdu mál við sær. Spælararnir hjá Sóljuni vóru seinir aftur í verjustøðu, og so var tað lætt hjá heimaliðnum at gera eitt mál fyri og annað eftir.

Í onkrar kontrastøðu stóðu tríggir Stjørnuspælarar leysir frammanfyri allar Sóljuspælararnar, og so var tað bara spurningur um at velja, hvør skuldi gera málið.

### Munurin kom skjótt

Stjørnan brúkti allar sínar spælarar í hesum dystinum, og nógvar skiftingar vóru gjørdar. Allar tríggir málverjarnir sluppu at royna seg.

Sóljan hevur ikki somu breidd á sínum liði, og enn einaferð var tað serliga lagt upp í hendurnar á Astu Petrauskiene at gera málini. Álopsspælið hjá Sóljuni var onkra løtu í fyrra hálvleiki gott, men tað gjørdist so við og við langt ímillum glottarnar hjá gestunum, og tað tóktist sum spælararnir møddust.

Stjørnan var alla tíðina framman fyri við nøkrum málum, men fyrsta korterið var lítil munur á liðunum. Tá Stjørnan fram móti steðginum setti ferð á spælið hjá sær, og kontraálopini eydnaðust betri, kom munurin so líðandi. Í hálvleikinum vóru átta mál á muni, og tað var grundarlag undir, at Stjørnan kundi vinna stórt, tá samanumkom.

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-Sóljan 37-17 (16-8)**

Málskjúttar:

Stjørnan: Simon Dzuigyte 10 (3), Andrijana Milodanovic 8, Anna Kristina Samson 6, Joan Midjord Joensen 6 (1), Bára Skaale 3, Una Olsen 2, Beinta Klakkstein 1, Jastrid Gullaksen 1.

Sóljan

Sóljan: Asta Petrauskiene 9 (2), Hertha Simosen 3, Sólja Jóanisdóttir 3, Heidi Maria Askham 1, Petra Thomassen 1.

Brotskøst: Stjørnan 8, Sóljan 2

Útvísingar: Stjørnan 3, Sóljan 3

Diskvalifikatión Sóljan 1 (beinleiðis reytt)

Dómarar: Kristian Johansen og Hans Thomasen

Stjørnan-VB 27-23 (12-9):

# Fingu leiðsluna í evstu løtu

**Seinastu fimm minuttirnar av fyrru hálvfinaluni í steypakappingini kláraði Stjørnan at oda seg fýra mál fram um VB**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Stjørnan fekk eina fýra máls leiðslu burtur úr fyra hálvfinaludystinum ímóti VB. Men tað var ikki líkt til, at dysturin skuldi enda soleiðis, tí tá fimm minuttir vóru eftir at spæla stóð á jøvnum, og tá tóktist VB vera komið fyri seg.

Heimaliðið skilti tó álvarsomu støðuna, og seinastu minuttirnar av dystinum eydnaðist tað Stjørnuni at toga seg fram um aftur, so at heimaliðið skapti sær eina leiðslu upp á fýra mál áðrenn seinnu hálvfinaluna, sum verður í Vági leygardagin.

Dysturin í Klaksvík vísti tó, at javnt var millum liðini, og at VB hevur møguleika at vinna við sama muni í Vági. Tað gjørdu tær eisini seinast, Stjørnan var á vitjan har suðuri.

### Byrjaðu væl

Stjørnan legði væl fyri, og fyrstu løtuna legði heimaliðið seg fram um við fleiri málum.

Tað eydnaðist væl at steðga álopsspælinum hjá VB hesa løtuna, og hinvegin var álopsspælið hjá Stjørnuni stundum gott.

Tá 10 minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki var støðan 10-5 til Stjørnuna, men tað eydnaðist VB at toga seg nakað inn á vertirnar, so munurin var upp á trý mál í hálvleikinum.

Stjørnan helt fast um leiðsluna langt inn í seinna hálvleik, og hóast munurin líðandi minkaði, so var tað ikki fyrr enn átta minuttir vóru eftir at spæla, at VB fyrstu ferð kom upp á javnt aftur.

VB sýndi gott spæl í pørtum av seinna hálvleiki, meðan heimaliðið stundum rendi seg fast.

### Stjørnan ressaðist

Spenningurin var stórur millum teir mongu áskoðararnar, tá hol varð sett á seinastu fimm minuttirnar. Málið hjá Stjørnuni var púra greitt. Liðið mátti fáa vinna dystin við nøkrum málum, so tær kundu hava eina leiðslu við sær til seinna dystin í Vági.

Tað bar eisini til hjá heimaliðnum at ressast seinasta partin av dystinum. Fleiri spælarar tóku um endan og gjørdu mál, og tá kláraði VB ikki longur at hanga í. Stjørnan fekk sjey mál seinastu seks minuttirnar, meðan VB bert fekk trý.

Hóast ein sigur upp á fýra mál, er einki avgjørt í hesi hálvfinaluni. Seinni dysturin í Vági leygardagin skal vísa, um Stjørnan klárar at halda fast um finaluplássi í steypakappingini.

**Stjørnan-VB 27-23 (12-9)**

Málskjúttar

Stjørnan: Simona Dziugyte 8 (4), Anna Kristina Samson 6, Andrijana Milodanovic 5, Joan Midjord Joensen 4 (2), Una Olsen 2, Bára Skaale 1, Beinta Klakkstein 1

VB: Regina Rado 10 (6), Gabriella Fekete 4, Gurið Mortensen 3, Margreth Augustinussen 3, Eyðbritt Krosslá 1, Laila Jespersen 1, Sólrun Krosslá 1.

Brotskøst: Stjørnan 7, VB 6

Útvísingar: VB 6

Diskvalifiaktión: VB 1 (tríggjar útvísingar)

Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum og Hannis Wardum


Web-samskipari á Føroya Tele

"Byrjanin til alla vísind er ein undran á, at tingini eru, sum tey eru"
Aristoteles



Websamskipari okkara er farin í nýtt og avbjóðandi starv á Føroya Tele, og leita vit eftir einum nýggjum web-samkipara.

Hevur tú arbeitt við framtakshugaðum og framkomnum web-loysnum? Og hevur tú hug til menning, at forrita og at leggja inn ymisk internetforrit? Um ja, so ert tú møguliga tann m/k, vit ynskja at seta í fast starv á Føroya Tele. Sum høvuðsarbeiðsuppgávu fært tú ábyrgd av at samskipa og umsita forritpartin og teknisku menningina av websíðunum hjá Føroya Tele.

**Vit bjóða sera áhugaverdar arbeiðsumstøður á Føroya Tele, sum m.a. umfata:**
- rakstur og viðlíkahald av websíðunum hjá Føroya Tele
- at forrita serútgerð, brúkara-markamót o.a. tólbúnað
- at búna nýggjar internettænastur
- at veita innanhýsis ráðgeving
- møguleika fyri víðari sertifisering

**Tínar kvalifikatiónir umfata m.a. at tú:**
- í stóran mun dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ert nærlagdur/nærløgd
- hevur kunnleika til at forrita í: ASP, PHP, Adobe GOLive, SQL
- hevur kunnleika til Adobe ritbúnaðir (t.d. PhotoShop)
- hevur kunnleika og royndir innan TCP/IP og Internet
- hevur kunnleika til Windows2000 og – NT, SQL Server 2000, Access, MySQL
- hevur kunnleika til IIS/Apache webservara
- ert opin og dugir væl at tosa og læra frá tær
- hevur hugsjónir um Internet
- dugir enskt

Vit rokna við, at tú hevur útbúgving innan EDV ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving ella royndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi yrkisfelag, og verður starvið at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarleiðaran á Teleforlagnum, Jens Paula G. Nolsøe ella Starvsfólkadeildina. - Á Tel. 30 30 30.

Umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. januar 2002 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
FO-110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av megispartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krav til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!




StÍF-H71 37-31 (16-14):

# Málríkt á Skála


*Strandingar eru einsamallir á triðja plássinum, eftir at teir um vikuskifitð vunnu heimadystin ímóti H71*

**StÍF vann ein málríkan dyst móti Hoyvíkingum, og legði seg sostatt á odda í bronsudystinum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Kanska ikki avgerandi – men í øllum førum ein týðandi – dysturin í stríðnum um bronsumerkini varð leiktur inni á Skála sunnudagin, tá StÍF tók ímóti H71.

Hóast tað á stigatalvuni eru fleiri um boðið, so verður fyrst og fremst roknað við hesum báðum í stríðnum um bronsuna, og skal metast eftir sunnudegnum, so er tað í løtuni StÍF, sum liggur best fyri í hesum.

Í einum málríkum – og til tíðir undirhaldandi – dysti eydnaðist nevnliga StÍF at vinna sigur, sum eisini var hampuliga sannførandi, tá avtornaði.

Í fyrra hálvleiki var munurin millum liðini annars ikki hin stóri. Heimaliðið hevði kanska takið, men tó ikki meira enn so, at H71 við einum væl upplagdum Bjarna Wardum alla tíðina var í hølunum á teimum, og eitt skifti enntá var á odda.

Í seinna hálvleiki gekk somuleiðis hampuliga javnt á, men tað var alla tíðina líkt til, at StÍF skuldi strúka avstað við sigrinum. Ikki minst tí hoyvíkingar høvdu sera ilt við at gera sær dælt av teimum yvirtalsstøðum, sum íkomu undir dystinum.

Tað var tó ikki fyrr enn seinastu tíggju minuttirnar ella so, at veruligt glið kom á heimaliðið. Hoyvíkingar vórðu trýstir at satsa meira í royndunum at vinna dystin, og hetta kostaði í verjupartinum, og tá hetta so var hent, góvu gestirnir skarvin yvir.

Við sigrinum tryggjaði StÍF sær ein hampuliga fyrimun í stríðnum um bronsuna, og so er spurningurin, um teir fara at sýna ein størri stabilitet hesaferð, enn tá teir vóru í líknandi støðu í grundspælinum.

Ofta hevur tað verið soleiðis, at liðið er sterkari í endaspælinum, og verður hetta galdandi aftur í ár, er lítið at ivast í, at bronsumerkini koma til høldar.

Hjá hoyvíkingum er ikki annað at gera, enn at reisa seg aftur, tá høvi býðst. Fyri fyrst eru teir í øllum førum settir av í bronsustríðnum, og skal hetta vinnast aftur, er í øllum førum neyðugt, at dystirnir moti veikaru liðunum í deildini kasta stig av sær. Heldur ikki hjá teimum var stabilitetur nakað, sum eyðkendi liðið í grundspælinum, og tí er tað fyrst og fremst hetta, sum teir nú eiga at sóknast eftir.

### Dysturin tølum

**StÍF-H71 37-31 (16-14)**

Málskjúttar:

StÍF: Artur Johansen 8(2), Janus Trýgvason 8, BEnt Djurhuus 7, Costin Dumitrescu 4, Andre Danielsen 4, Marius Joensen 3, Jón Rasmussen 2, Sveinur Justinussen 1

H71: Bjarni Wardum 15(5), Halgir Dahlø-Olesen 5, Hallur Danielsen 4, Finnur Hansson 3, Kristjan Pætursson 3, Anfinnur N. Debess 1

Brotskøst: StÍF 2, H71 5

Útvísingar: StÍF 6, H71 4

Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum

# Norðmaður til FCK

Seinastu mánaðirnar hevur talan mest sum bert verið um frágongd, tá skrivað hevur verið um leikarahópin hjá FCK.

Nú tykist tað tó, sum um Flemming Østergaard hevur funnið onkran leikara, sum hann er til reiðar at nýta nakrar av mongu FCK-milliónunum uppá.

Talan er um 30 ára gamla norska landsliðsleikaran, Erik Mykland, sum í løtuni er sáttmálabundin at 1860 München, men sum í longri tíð hevur havt eitt ynski um at sleppa burtur frá felagnum.

Sambært norskum miðlum er FCK til reiðar at lata einar sjey milliónir krónur fyri leikaran, sum sambært somu miðlum kann rokna við eini ársløn upp á somu upphædd. Ein løn, sum sostatt ger hann til best lønta leikaran í donskum fótbólti.

Enn hevur FCK ikki gjørt nakrar viðmerkingar til slaturin, men tað verður av nógvum roknað fyri vist, at Mykland kemur til FCK, og tosið er ikki vorðið minni, eftir at Ståle Solbakken hevur givið sína meting av landsmanninum.

Sambært Solbakken verður Mykland uttan iva ein hin størsta »succes'in« í donsku superliguni, um hann kemur til FCK, sigur Solbakken, sum sjálvur bar hetta heitið, tá hann hevði roynt seg í superliguni fyrsta árið.

**-jm**

# Missa í oddinum

Í einum dysti, sum ensku fjølmiðlarnir skýra fyri sera vánaligan, taptu Julian Johnsson og liðfelagarnir úr Hull móti oddaliðnum, Plymouth.

Málið hjá Plymouth kom miðskeiðis í fyrra hálvleiki eftir hornaspark, og eftir hetta vóru ikki stórvegis av møguleikum.

Julian varð skiftur út, tá gott korter var eftir at spæla, men heldur ikki hetta tóktist hjálpa Hull. Teir taptu dystin, og eru nú á sætta plássinum í deildini, og soleiðis í vanda fyri at missa møguleikan fyri sonevndu play-off dystunum.

**-jm**

### Enska 3. deild

| | | d | v | - j | - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 26 | 16 | -7 | - 3 | 37 | 15 | 22 | 55 |
| 2 | Luton | 27 | 16 | -5 | - 6 | 54 | 34 | 20 | 53 |
| 3 | Mansfield | 25 | 13 | -5 | - 7 | 38 | 27 | 11 | 44 |
| 4 | Shrewsbury | 27 | 12 | -7 | - 8 | 38 | 30 | 8 | 43 |
| 5 | Rochdale | 25 | 12 | -7 | - 6 | 35 | 27 | 8 | 43 |
| 6 | Hull C. | 25 | 11 | -8 | - 6 | 37 | 26 | 11 | 41 |
| 7 | Kidderm. | 26 | 12 | -5 | - 9 | 33 | 26 | 7 | 41 |
| 8 | Cheltenham | 26 | 10 | -10 | - 6 | 38 | 34 | 4 | 40 |
| 9 | Scunthorpe | 25 | 10 | -9 | - 6 | 43 | 29 | 14 | 39 |
| 10 | R&D | 26 | 9 | -9 | - 8 | 32 | 29 | 3 | 36 |
| 11 | Exeter | 26 | 9 | -8 | - 9 | 27 | 39 | -12 | 35 |
| 12 | Southend | 26 | 10 | -4 | -12 | 30 | 30 | 0 | 34 |
| 13 | Hartlepool | 25 | 9 | -6 | -10 | 33 | 25 | 8 | 33 |
| 14 | Oxford Utd. | 27 | 8 | -8 | -11 | 35 | 35 | 0 | 32 |
| 15 | Swansea | 27 | 8 | -8 | -11 | 34 | 39 | -5 | 32 |
| 16 | Leyton O. | 26 | 8 | -6 | -12 | 39 | 47 | -8 | 30 |
| 17 | Darlington | 24 | 8 | -5 | -11 | 27 | 33 | -6 | 29 |
| 18 | Lincoln C. | 26 | 6 | -11 | - 9 | 27 | 34 | -7 | 29 |
| 19 | Bristol R. | 25 | 7 | -7 | -11 | 23 | 31 | -8 | 28 |
| 20 | Macclesfield | 26 | 6 | -9 | -11 | 23 | 33 | -10 | 27 |
| 21 | Torquay | 27 | 6 | -7 | -14 | 23 | 42 | -19 | 25 |
| 22 | York | 24 | 6 | -6 | -12 | 28 | 42 | -14 | 24 |
| 23 | Carlisle | 24 | 5 | -8 | -11 | 25 | 31 | -6 | 23 |
| 24 | Halifax | 25 | 4 | -9 | -12 | 18 | 39 | -21 | 21 |

# Rætting

Tá vit í leygardagsblað okkara skrivaðu um vágamenn, sum spæla í øðrum feløgum enn FS Vágum, komu vit av misgávum at skriva, at Jóhannis Færø úr HB var ein av hesum. Talan skuldi sjálvandi vera um Eyðfinn Fjalsbak, sum saman við Jóhannis Joensen og Tór-Ingar Akselsen eru vágamenninir, sum verða við HB komandi kappingarár.

**- jm**